## Argentina jarðlegði Kolumbia

Kolumbia hevði so at siga ongan møguleika móti Argentina, sum hevði stillað seg upp í sera sterkari uppstilling. Stjørnupakkaða liðið hjá Argentina hevði heldur ikki stórvegis trupulleikar at vinna 4-2. Annars var tað Kolumbia, ið legði seg á odda. Eitt brotsspark setti tó Argentina í gongd, sum við málum frá Riquelme (2), Crespo og Diego Milito nú skal møta 'finaluni' um fyrsta plássið í bólkinum.



## Meksiko víðari í Copa America

Síðstu nátt spældi Meksiko seg víðari í Copa America kappingini við næsta sigrinum av líka nógvum møguligum. Fyrsta dystin vunnu teir 2-0 ímóti Brasilia, og náttina til mánadagin møttu teir so Ekvador. Nery Castillo legði Meksiko á odda 1-0 eftir eina góða avlevering frá Rafael Marquez, og móti endanum av dystinum økti Omar Bravo til 2-0 við høvdinum, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

# Sílið aftur ovast

**Leygardagin bragdaði aftur hjá kvinnunum umborð á Sílinum, tá tær vunnu FM-róðurin á Varmakeldu. Róðurin lagaði seg eisini soleiðis, at munurin frá Sílinum niður til næsta bátin í FM-stríðnum nú er heili 6 stig**



*Sílið styrkti munandi um sína støðu í FM-stríðnum eftir sigurin á Varmakeldu. Úrslitini lagaðu seg nevniliga so væl fyri Sílið, at tær nú brádliga eru seks stig framman fyri bæði Ørnina og Frúnna í stríðnum um meistaraheitið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**KAPPRÓÐUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mest spennandi kappingin fyrstu tríggjar róðrarnar hevur uttan iva verið kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum, har tríggir ymiskir vinnarar hava verið eftir tríggjar teir fyrstu róðrarnar.

Í samlaðu støðuni í FM-kappingini vóru eisini bert fýra stig, sum skiltu fyrstu fýra bátarnar, men hetta megnaði Sílið rættiliga at broyta á Varmakeldu. Tær gjørdu ikki mætari enn at vinna róðurin rættiliga trygt. Hini úrslitini lagaðu seg so, at tað nú eru heili seks stig á muni niður til næsta bátin.

### Gleði umborð á Sílinum

Eingin ivi var um, at gleðin var stór umborð hjá kvinnunum á Sílinum eftir sigurin á Varmakeldu.

- Hetta følist ónatúrliga gott. Tað er hetta vit hava kempa fyri síðstu róðrarnar, og í dag róðu vit allar sum ein, sigur Ingunn Jensen.

Tað er heldur eingin ivi um, at sigurin hevði stóran týdning fyri Sílið, serliga tá hugsa verður um støðuna í FM-lappingini.

- Tað hevur ikki gingið heilt eftir vild hjá okkum síðstu róðrarnar, men hetta hugsa vit ikki um eftir sigurin á Varmakeldu. Nú hyggja vit fram til næstu stevnu, sum vit eisini mugu royna at vinna. Sigurin á Varmakeldu hevði annars sera stóran týdning fyri okkum, serliga tá man hugsar um, at úrslitini lagaðu seg so væl, at vit nú eru heili seks stig framman fyri næstu bátarnar í FM-kappingini, sigur Ingunn.

Ingunn sigur at enda, at hon heldur tað ikki vera so løgið, at kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum hevur verið so jøvn í ár.

- Tað er einki løgið í, at tríggir ymiskir bátar vunnu fyrstu tríggjar stevnurnar, tí har eru nógvar góðar manningar við í kappingini. Eini fimm ella seks manningar kunnu vinna ein róður á einum góðum degi, og hetta ger kappingina og róðrarnar sera spennandi.

# Havfrúgvin økir um leiðsluna

**Havfrúgvin fekk góða hjálp frá bygdarmonnunum úr Vestmanna í stríðnum um FM-heitið, tá ið Junkarin sendi Sílið niður á triðja plássi á Varmakeldu**

**KAPPRÓÐUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin*

Havfrúgvin og Sílið hava bart um oddasessin í 5-mannaførum við dreingjum, og undan Varmakelduni í Fuglafirði leygardagin hevði Havfrúgvin vunnið tveir róðrar, meðan Sílið hevði vunnið ein. Í FM-stríðnum vóru eisini bert tvey stig, sum skiltu Havfrúnna og Sílið undan róðrinum leygardagin.

### Hjálp frá bygdarmonnum

Men manningarnar úr Vestmanna vildu tað tó soleiðis, at tær settu seg á bæði fyrsta og annað plássi í kappingini á Varmakeldu. Havfrúgvin vann fyri triðju ferð á rað róðurin hjá 5-mannaførum við dreingjum, men hesaferð vóru dreingirnir á Junkarinum nummar tvey. Fyrstu tríggjar róðrarnar hava hesir róð við Jómfrúnni, sum er gamla Havfrúgvin, men á Varmakeldu høvdu teir valt at royna Junkaran, sum hoyrir heima í Kvívík.

Hetta vísti seg at vera ein góð avgerð, tí dreingirnir úr Vestmanna fingu eitt annað pláss, samstundis sum teir syrgdu fyri, at Havfrúgvin økti um munin í samlaða FM-stríðnum, soleiðis at tað nú eru seks stig á muni millum Havfrúnna og Sílið.

### Sera gott

John Johannesen er bátsformaður umborð á Havfrúnni, og hann segði, at tað føldist sera gott at vinna í Fuglafirði leygardagin.

- Tað er altíð fantastiskt at vinna, men tað hjálptu nógv upp á tað, at Junkarin bleiv nummar tvey og Sílið nummar trý, tí hetta ger, at vit styrktu um okkara støðu í FM-stríðnum, sigur John.

- Tað er eisini sera gott at fáa eina hjálpandi hond frá bygdarmonnunum umborð á Junkarnum, leggur John afturat.

Hann sigur annars, at starturin var ikki tann besti á Varmakeldu, og at tað serliga var í miðróðrinum, at teir fóru frá m.a. Sílinum.

- Ja, eg haldi ikki, at starturin var so góður, men sum eg skilji á lagnum, so tóku vit á leið eina bátslongd frá Sílinum í miðróðrinum, so hetta gjørdist helst avgerandi, helt John.



*Havfrúgvin vann fyri triðju ferð á rað hjá 5-mannaførum við dreingjum. Hesa ferð fingu teir harafturat góðu hjálp frá bygdarmonnunum umborð á Junkarinum, sum við einum góðum róðri sendu Sílið niður á triðja plássi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*